## Gamal skøltur

Ein týskur trolari, sum royndi eftir kræklingi úti fyri niðurlendsku strondini, fekk ein mannaskølt í trolið. Týskir vísindamenn, sum hava kannað skøltin, siga, at hann er minst 40.000 ára gamal. Er tann metingin røtt, er hetta tann elsti mannaskølturin, sum nakrantíð er funnin í sjónum, skrivar blaðið Geo Magazine. Saman við skøltinum fekk trolarin fleiri amboð so sum eina øks, sum ivaleyst eru líka gomul sum skølturin. Týsku vísindamenninir siga, at hóast skølturin er funnin á havbotninum, búði maðurin uppi á landi, tí tá í tíðini var landfast ímillum Niðurlond og Bretland, skrivar Geo Magazine.



## Ráðharrar fingu sekkin

Fýra ráðharrar í iransku stjórnini fingu sekkin í gjár. Mahmoud Ahmadinejad, forseti, fer at skipa nýggja stjórn fyrsta dagin, men hesir fýra sluppu ikki at sita skeiðið út. Millum teirra, sum fingu sekkin, vóru fregnartænasturáðharrin og ráðharrin í mentanarligari og islamskari vegleiðing. Mahmoud Ahmadinejad vann iranska forsetavalið í juni, men túsundtals iranar og fólk í øðrum londum hava lagt myndugleikarnar undir valsvik. Almenna tíðindastovan Mehr skrivaði í gjár, at Ahmadinejad verður tikin í eið tann 5. august.

Gamli Silly-Boysarin, Jóannes í Innistovu, í studionum:

# Syngur landaplágur frá sekstiárunum inn á fløgu

**TÓNLEIKUR**
*Símun úr Konoy*

- Eg havi í nógv ár havt ein dreym um at syngja nakrar sangir í einum ljóðstudio og brenna teir niður á nakrar fløgur, og nú er mangt sum bendir á, at dreymurin gerst veruleiki.

Soleiðis sigur Jóannes í Innistovu, sum gjørdist heimskendur í Føroyum í sekstiárunum, tá ið hann var sangari í navnframa tónleikabólkinum The Silly Boys, sum helt til í dansistovuni í Fuglafirði.

- Sjey sangir eru komnir undir land, men um tíggju ella tjúgu vera á fløguni, tá ið hon einaferð í framtíðini stendur á hillunum í handilsbúðunum, tað er støða ikki tikin til enn, men eg havi ov mikið av tilfari, sigur Jóannes, sum manna millum ikki verður nevndur annað enn Silly Jóannes.



*Fuglfirðingurin Jóannes í Innistovu, er farin í upptøkuhølini at syngja nakrar enskar 60-ara landaplágur. Fløgan kemur út seinni í ár.*

### Philip Stange

Hin 60 ára gamli Jóannes í Innistovu, er útiseti. Hann flutti til Danmarkar miðskeiðis í 90-unum, og hevur saman við familjuni seinastu árini verið búsitandi í lítla býnum Grindsted nærhendis Billund í Miðjútlandi.

Fyri góðum ári síðani setti ein dani, sum eitur Philip Sprange, seg í samband við Jóannes. Hann er ánari av einum ljóðstudio, ið nevnist Pladeselskab DK. Umvegis umboðsmanninum hjá Jóannesi, Jimmy Phil, hevði hann hoyrt, at føroyingurin í Grindsted hevði eina megnar rødd.

Hann bjóðaði tí Jóannesi at støkka innar á gólvið hjá sær onkun dagin, so hann fekk høvi at hoyra hann syngja. Jóannes tók av, og tá ið hann hevði sungið fyrsta sangin, var Philip Sprange ikki í iva – hesin føroyingurin hevði eina so mikið góða rødd, at hon skuldi spælast inn og fáast út til almenningin.

### Ikki skund

- Tað, ið umræður er, at tað vit leggja fyri dagin er borðbært bæði so og so. Vit hava ikki skund, og tí verða summir sangir sungnir um aftur – ikki av tí, at eg viðhvørt ikki raki tónan, men av tí, at alt er á enskum, og tá mugu orðini úttalast á rættan hátt. Philip Sprange er ein sera nærlagin maður, og tað eri eg fegin um, sigur Jóannes.

Jóannes sigur, at stuttligt hevði verið um so var, at so mætir tónleikarar sum Jákup Zachariassen, Ólavur Øster og aðrir góðir gamlir føroyskir studiovandir garpar spældu tónleikin, men tíverri eru ráðini ikki til tess. Tí verður tað teldutónleikur á høgum støði, sum fer at mynda trummur, gittarar við meira á fløguni.

Úrvalið verður ein blanding av tí besta, sum var og enn er á skránni av góðum, gomlum landaplágum úr sekstiárunum, sum t.d. "Cryin' Time", "My Way", "Young Girl" við meira.

### Kanska bert seld á netinum

- Eg rokni við, at fløgan er liðugt innspæld og sungin einaferð í ár, og tá fara vit at taka støðu til, um skivan verður framleidd sum ein verulig fløga, ella um ymsu sangirnir verða lagdir út á Alnótina, soleiðis at fólk kunnu taka teir niður (downloada teir) fyri eina ávísa upphædd. Gongur eftir ætlan, verður fløgan at finna bæði á handilshillunum og úti á netinum, men endalig støða er sum sagt ikki tikin til hetta enn, sigur Jóannes í Innistovu at enda í samrøðuni.

Tey, ið hava hug at hoyra megnar rødd Jóannesar, kunnu kaga innar á heimasíðu hans, www.innimann.dk

Ólavsøkuframsýningin 2009

## landslag.fo/09

**avmyndan-umskapan-avskapan**

**TÍÐINDASKRIV**
*Listafelagið*
*www.listafelag.fo*

Stórur áhugi hevur verið fyri at senda inn til Ólavsøkuframsýningina í ár. Nevndin í Listafelagnum hevur tikið móti langt oman fyri hundrað myndum og verkum undir yvirskriftini landslag.fo/09. Við á framsýningina koma umleið 90 verk eftir 30 listafólk, 13 menn og 17 kvinnur. Níggju eru fyrstu ferð við í Ólavsøkuframsýning, og verk teirra eru málningar, foto- og steintoysverk. Harumframt eru standmyndir úr sandsteini, pappíri, stáltráði, installatiónir og verk úr aðrari samansettari tøkni.

Framsýningin á ólavsøku í ár verður størri enn undanfarin ár, tí nú er betri pláss. Í ár er evnið landslag í nútímans teldutøkni- og alnetmentanarmerking. Í flestu førum er talan um avmyndingar av náttúrufyribrigdum sum fjøllum og fólkum sædd sum landsløg. Summar avmyndingar loysa kendar formar í landslagnum sundur og endurskapa teir í rúmd. Aðrar leggja dent á tað umskapaða náttúrutilfarið ella avskepla landsløg fyri at seta sjóneykuna á, hvussu sumt verður tilnevnt at vera landslagsikon. Undir tí býr, at onkursvegna er ein sterk trá í mentanini eftir at skapa slík ikon við ávísum eyðkennum. Uppaftur onnur verk seta sjóneykuna á fatanir av hvat landsløg kunnu vera her heima og úti í heimi. Avskapaðu landslagsmyndirnar seta spurnarteknini við list og við landslagsfatanir í okkara tíð. Ólavsøkuframsýningin letur upp ólavsøkuaftan kl. 14. Ólavsøkudagarnar báðar letur framsýningin aftur kl. 20. Hon er opin til sunnudagin 9. august kl. 11-17. Atgongumerkini kosta 50 kr., børn koma inn ókeypis.

Tað er Listafelag Føroya sum skipar fyri framsýningini. GrafiskiVerkstaðurin flutti í vár oman á Skálatrøð. Hølini, har tað hevur húsast seinastu árini, eru tikin inn framsýningarhølini. Tann parturin av Listasavninum, sum upprunaliga var Listaskálin, hevur nú aftur ta støðd, sum hann hevði, tá ið Listafelagið bygdi hann.

# Hornabømaður 60 ár í dag

Í dag fyllir havnamaðurin Birgir Bærentsen Wang 60 ár. Birgir er sonur kendar, farnar havnamyndir, nevniliga Jóhannus og Elsu Wang. Birgir vaks upp í Hornabø, ið tá var eitt satt eldorado fyri børn, har dunnur og hønur skuldu rekast inn hvørt kvøld. Áin - fjørðan – Sandagerð, hetta vóru pallarnir, har Birgir traðkaði sínar barnaskógvar. Gera og koyra kassabil - og á flakum í Álagerði, soleiðis var barndómurin hjá Birgir. Kríggj var tó eisini ein partur av uppvøkstrinum, kanska ikki gerandisdagur



og ikki so, at lív lá eftirá, men tá bambustráðurnar fóru tvørtur um nakkan og træpettini við ferð vórðu send gjøgnum luftina, tá fekk mangur Hornabø drongur pínu at føla, eisini Birgir.

Birgir gekk í barnaskúla hjá nonnunum og fór síðani í Tórshavnar Kommunuskúla. Lærdi til elektrikara og síðani til maskinmann. Birgir sigldi í fleiri ár, og á landi var huguin til familju, trøðna og tað, sum har til hoyrir. Sum ungur var Birgir glaður fyri at setast við ár í hond og rógva kapp, hetta gav eisini vinir og felagsskap.

Birgir er blíður, gávumildur, familjukærur og vertskapsmaður. Tann, sum hevur Birgir til sín vin, hevur besta vinin ein kann ynskja sær, trúðfastari vin fært tú ikki.

Føðingardagurin varð hildin fyri teimum nærmastu síðsta leygardag.

Góði Birgir, hjartaliga tillukku við árunum og alt tað besta framyvir.

**Vinir og familja**

## Tøkk

Hjartaliga takka vit fyri sýnda samkenslu og hjálpsemi, tá kæri pápi, verpápi, abbi og langabbi okkara

**Osvald Hansen**

andaðist og varð jarðaður.

*Familjunnar vegna*
**Gunnleyg og Óli**